# TAÐ HENDIR ...

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein



## STERKUR FILMUR

Framúr góði spenningsfilmurin um privatdetektivin Tom Welles, sum veðrur spældur av Nicholas Cage í toppformi. Steinandlitið hjá Cage er sum gjørt til júst hendan filmin, har Cage fær til uppgávu at kanna ein óhugnaligan film, sum ein einkja eftir ein ríkmann finnur í einum pengaskápi.

**8MM**
SvF fríggjakvøldið 27/11
kl. 00.20

## JÓLABYGDIN TENDRAR

Æðuvík er jólabygdin fram um aðrar her í Føroyum. Har verður nógv gjørt burtur úr at pynta við litum og ljósum. Sunnudagin verða ljósini í bygdini tendrað, so er lag á manni at leggja leiðina fram við í jólaligu og hugnaligu bygdini í Eysturoynni.

**JÓLABYGDIN ÆÐUVÍK TENDRAR**
Sunnudagin 29/11 kl. 19.00



## JENS OKKING

Hann verður roknaður millum teir bestu og fólkakærastu sjónleikararnar í Danmark, og hann hevur eisini verið í Føroyum og spælt film inn. Jens Okking, sum rundar sjeyti í desember, hevur sagt sína søgu fyri elsta soni sínum, og hann hevur skrivað bókina um pápan. Jens Okking fortelur um at missa konu sína, um sína depression, um nógvu kvinnurnar í hansara lívið og um sítt sjónleikarlív.

**NIELS OKKING**
Jens Okking
Politikens Forlag






## MINNAST INGÁLV

Hann telist millum stóru listarmenninar í Føroyum, og í dag letur upp ein minniframsýning um Ingálv av Reyni. Á framsýningini eru fleiri høvuðsverk, m.a. hjá LIstasavninum, verk lánt frá stovnum og privatum í Føroyum, umframt høvuðsverk sum eru lánt frá søvnum í Danmark.

**LISTASAVN FØROYA**
Fríggjadagin 27/11-28/2



## STÓRI FÍGGINDIN

Leikstjórin Michael Mann hevur skapt hendan filmin um víðagitna brotsmannin John Dillinger, sum rændi bankar. Johnny Depp spælir høvuðsleiklutin í filminum, og Marion Cotillard hevur leiklutin sum einasta kvinnan, sum megnar at vinna hjartað á Dillinger.

**PUBLIC ENEMIES**
dvd



## HVAT VILJA KVINNUR HAVA?

Í kvøld savnast mannfólk í Klaksvík, har tey millum annað fáa at vita frá tveimum sexologum, hvat konufólk nú á døgum vilja hava. Eisini verða sexleikur og mótasýning, og umboð fyri Artharmonia fer at greiða frá møguleikum at broyta kroppin og útsjónd. Gunnar Nolsøe verður vertur fyri mannfólkakvøldið.

**MANNFÓLKAKVØLD**
Atlantis í Klaksvík
Fríggjakvøldið 27/11 kl. 20.00

## OV NÓGV ROCK 'N ROLL

Gittarspælarin Nikki Sixx leggur ikki fingrarnar ímillum í hesari bókini, har hann greiðir frá, hvussu hann endaði úti í lívshóttandi rúsevnismisnýtslu. Nikki Sixx er tónleikari í kenda amerikanska rockbólkinum Motley Crue. Bókin greiðir nágreiniliga frá, hvussu lívið hjá Nikki Sixx endar sum ein marra, har heroin-mistnýtsla var við at taka alt frá honum – familjuna, karrieruna, ja, eisini lívið. Men Nikki Sixx fekk vent skeivu gongdini í tøkum tíma.

**NIKKI SIXX**
The Heroin Diaries
Ævisøga

